# Fekk uppsøgnina við postinum

**Fríða Eystberg Johannsen varð mánadagin søgd úr starvinum sum leiðari fyri barnagarðin í Skopun. Hon flutti heim úr Danmark til hetta starvið, tey bygdu í heimbygd hennara, men nú verður hon helst noydd at flyta burtur aftur**

Randi Jacobsen

Mánadagin fekk Fríða Eystberg Johannesen innskrivað bræv við postinum. Brævið var frá Skopunar kommunu, og tað var eitt ætlanarskriv um, at hon verður uppsøgd úr starvinum sum leiðari í barnagarðinum í Skopun.

Í brævinum stóð, at við tað at hon hevði verið so nógv burturi, var tað ikki haldbart fyri kommununa og barnagarðin, at hon helt fram.

Fríða Eystberg Johannesen var mállеys.

### Fekk stóra skurðviðgerð

Rætt er tað, at hon hevur verið nógv burturi frá arbeiði. Fyrr í ár var hon sjúkrameldað, men fór til arbeiðis aftur aftaná summarferiuna.

Í september varð hon løgd inn á sjúkrahúsið og fekk stóra skurðviðgerð og varð sjúkrameldað í tríggjar mánaðir.

– Eg var klár at byrja aftur 1. januar, sigur Fríða Eystberg Johannesen, sum tó ikki er sligin út av uppsøgnini. Skurðviðgerðin og avleiðingarnar av henni fylla framvegis so nógv í huganum.

– Alla hesa tíðina hevur kommunan ongantíð sett seg í samband við meg, eg havi onga ávaring fingið og eri ikki kallað inn til samtalu ella nakað, sigur Fríða Eystberg Johannesen.

Kommunan ætlaði at siga hana upp frá 1. desember, men tað gekk ikki, tí hon var í sjúkrafarloyvi.

Hon er ikki greið yvir, um aðrar orsøkir kunnu vera til, at hon varð søgd úr starvi.

### Bein í nøsini

Eingin samanbrestur hevur verið, men Fríða Eystberg Johannesen dylir ikki, at hon og Gerhard Lognberg ikki altíð hava verið samd, og at hon er ein kvinna, sum krevur, at reglurnar skulu haldast, eitt nú tá ið starvsfólk verða sett í starv ella søgd eru starvi. Slíkt er ikki altíð líka væl dámt.

– Tað kann eisini vera, at tey halda meg kosta ov nógv, tí eg havi høgan starvsaldur, men tað hevði eg eisini, tá ið eg byrjaði.

Enn hevur hon ikki sett seg niður at hugsa um framtíðina.

Tá ið barnagarðurin læt upp fyri fýra árum síðan, søkti hon leiðarastarvið og fekk tað. Hon flutti tá úr Danmark saman við familjuni heim til Skopunar, har tey bygdu sær hús.

– Nú veit eg einki. Vit verða helst noydd at flyta aftur, tí her tími eg ikki at vera við ongum arbeiði, sigur Fríða Eystberg Johannesen, sum upplivir uppsagnina sum, at kommunan við uppsøgnini hevur traðkað á eitt liggjandi fólk.

Umframt leiðaran eru tvey onnur starvsfólk í barnagarðinum søgd úr starvi. Tær vóru báðar dagrøktarmammur, áðrenn barnagarðurin læt upp fyri fýra árum síðan og hava starvast hjá kommununi í yvir 20 ár.




*Alt var sára gott, tá ið Fríða Eystberg Johannesen fyri fýra árum varð sett í starv sum leiðari í barngarðinum, og Gerhard Lognberg, borgarstjóri ynskti henni væl komnari*

# Lívdin keypir hús

**Samkoman Lívdin í Hoyvík fer fyrsta dagin at yvirtaka eini hús í Hoyvík til síni tiltøk**

Randi Jacobsen

Higartil hevur samkoman Lívdin í Hoyvík hildið til í leigaðum hølum, men herfyri segði útleigarin leigumálið upp, og Lívdin gjørdist heimleys.

Lívdin hevur í fleiri ár átt eitt grundøki við Vegin Langa. Økið er planerað, og har er ætlanin at byggja stórt felagshús.

– Men sum tíðirnar eru, hava vit útsett byggiætlanirnar, sigur Jógvan Zachariassen, ein av leiðarunum í Lívdini.

Í staðin fyri at finna nýggj høli at leiga, helt samkoman tað vera betri at keypa eini hús til virksemi sítt. Húsini eru ein stór sethús tætt við, har samkoman skal byggja. Skeytið er ikki undirskrivað enn.

Jógvan Zachariassen vil ikki upplýsa, hvat húsini kosta.

### Fíggjað við gávum

Húsakeypið verður fíggjað við peningagávum, sum Lívdin eins og aðrar samkomur fær frá fólki.

Samkoman brúkar ikki, at fólkini í samkomuni lata tíggjund, og samkoman hevur ikki skrásettar limir.

Í Lívdini eru alskyns tiltøk, og til samkoman flytir inn í hús síni, verða tiltøkini heima hjá fólki í samkomuni.

randi@sosialurin.fo



*Tiltøkini hjá Lívdini hava verið ymsa staðni. Sunnudagsskúlin hevur verið í skúlanum í Hoyvík*

## Eingi tilboð

**Í revsilógini er ein regla um at geva truplum unglingum viðgerðardóm, men landið hevur onga tilbúgving**

Randi Jacobsen

Tað dugir ikki bara at samtykkja lógarbroytingar, um ikki ber til at liva upp til hesar broytingar.

Í januar samtykti løgtingið nakrar broytingar í revsilógini.

Ein grein sigur, at fólk undir 18 ár, sum hava framt álvarsligan kriminalitet, kunnu dømast til at fáa ein tvey ára viðgerðardóm, um hetta kann metast at fyribyrgja fleiri nýggjum lógabrotum.

– Eg varð ein dag spurdur í rættinum, um ein persónur í einum ávísum máli kundi dømast eftir hesi lógargrein, men tað ber ikki til, tá ið apparatið ikki er til, sigur Finn Ougaard.

Tað er í Føroyum ikki so nógv ung fólk, sum eru langt úti í kriminaliteti, og bara ein viðgerðardómur kann hjálpa teimum aftur á beint. Men onkur dømi eru tó.

Lógargreinin er ætlað unglingum millum 15 og 18 ár. Tað eru tey, sum hava sera ilt við at laga seg eftir lógum og reglum og hava framt grovan kriminalitet sum til dømis rán, harðskap ella neyðtøku. Høvdu tey ikki fingið viðgerðardóm høvdu tey verið dømd treytaleysa fongsulsrevsing millum 30 dagar og hálvtt annað ár.

Fyrsta stigið er at tey eru tveir til seks mánaðir, oftast tveir mánaðir á eini meira ella minni afturlatnari deild.

Næsta stigið er upphald á einum stovni í 12 mánaðir.

Har verður arbeitt við at rætta upp á sosialu atferðina hjá tí unga, at læra tey okkurt fakligt og læra tey alt tað gerandisliga. Tað ræður um at menna persónin, geva honum skúlagongd, seta hann í útbúgving ella arbeiði, finna eitt stað at búgva og fáa sær frítíðarítriv.

Kann tann ungi ella tann unga ikki liva eftir reglunum, kann viðkomandi sendast aftur til stongda stovnin.

Rætturin ger av, um ein unglingi skal dømast til slíka viðgerð, sosialu myndugleikarnir tilmæla.